# ÚTLOND

SAMBAND
Árni Joensen
fartekst@mail.dk
tlf 341800

*Kríggið fær stórar sálarligar avleiðingar fyri børnini í krígsøkinum. Tey síggja ymiskt, sum børn í Europa ongatíð hava sæð ella fáa at síggja.*

*(Rania al-Ameri, sálarfrøðingur)*

**STUTT SAGT**

## Óttast fyri borgarakríggi í Irak

Amerikanskir generalar stúra fyri, at ófriðurin í Irak kann enda við einum borgarakríggi.

Amerikanska stjórnin hevur leingi víst aftur øllum spádómum um, at ófriðurin í Irak kann enda við borgarakríggi, men nú kemur sami spádómur frá tveimum av teimum ovastu amerikonsku generalunum.

Í einari frágreiðing til Kongressina skriva generalurin John Abizaid, at eydnast tað ikki irakska stjórnarherinum og teimum útlendsku herdeildunum at fáa tamarhald á støðuni, kann ófriðurin enda við borgarakríggi millum shiamuslimar og sunnumuslimar. John Abizaid er ikki hvør sum helst, tí hann er ovasti amerikanski herleiðari í Miðeystri.

Generalurin Peter Pace, sum er í herleiðsluni í Pentagon, skrivar í sínari frágreiðing til Kongressina, at teir útlendsku hermenninir kunnu ikki forða fyri borgarakríggi í Irak. Tað kunnu einans irakar sjálvir, skrivar hann.

# Beirut bumbaður í sor



*Beirut fyri og eftir bumbuálopini*

*Mynd: Reuters*

**Aftur í morgun bumbaðu ísraelsk flogfør libanska høvuðsstaðin, Partar av býnum eru javnaðir við jørðina.**

Ísraelsku flogførini søktu í morgun at býarpartinum Uzai nærhendis altjóða floghavnini har suðuri í Beirut. Sambært Reuters er hesin býarparturin sloppin undan bumbuálopum, síðani ísraelska átakið í Libanon byrjaði, men í morgun søktu flogfør 19 ferðir at økinum. Uzai er stutt frá sjónum, og í morgun skutu ísraelsk herskip eftir býarpartinum, samstundis sum flogførini bumbaðu. Libansku myndugleikarnir søgdu, at tjúkkur roykur var at síggja nógvastaðni, men tað var ikki greitt, um álopið hevði kravt mannalív.

Nakrar fáar tímar undan álopinum á Uzai søktu ísraelsk flogfør at býunum Rweiss og Harel Hreik, ið verða roknaðir sum trúgvar støðir hjá Hizbollah. Sambært libansku myndugleikunum fingu 12 fólk skaða. Undan álopinum tveittu ísraelsk flogfør flogseðlar niður yvir býirnar við áheitan á fólkið um at fara úr býunum, áðrenn álopið byrjaði.

### Hótti Tel Aviv

Leiðarin í Hizbollah, Hassan Nasrallah, ávaraði í gjárkvøldið Ísrael ímóti at bumba Beirut, og hann hótti við at svara álopunum.

– Søkir Ísrael at okkara høvuðsstaði, fer Hizbollah at svara við at senda rakettir eftir Tel Aviv, segði Hassan Nasrallah.

Ísraelskir hernaðarserfrøðingar hava fyrr sagt, at Hizbollah kann hava rakettir, sum kunnu raka langt suður í Ísrael, og at tað tí ikki er óhugsandi, at felagsskapurin hevur rakettir, ið bera til Tel Aviv.

# Meiri enn 300 børn deyð í ísraelsku álopunum

**Umleið 450.000 børn eru flýdd undan krígnum í Libanon, og ein triðingur av teimum særdu eru børn**

Næstan ein millión libanar eru nú flóttafólk í egnum landi, og sambært libansku myndugleikunum eru umleið 45 prosent av teimum børn. Av teimum 615, sum hava latið lív í ísraelsku álopunum, er næstan helmingurin børn, og ein triðingur av teimum 3.200, sum eru særd í bardøgunum, eru børn.

Bretska blaðið The Independent hevur skrivað nógv um syndarligar barnalagnur í Libanon í seinastuni, og saman við einum bretskum barnahjálparstovni er blaðið farið undir at skipa fyri ymsum tiltøkum, ið skulu hjálpa teimum raktu børnunum. Eitt nú hava blaðið og felagsskapurin savnað pening til heilivág og mat.

Summar keldur hava sett spurnartekin við tíðindini frá libansku myndugleikunum um, hvussu mong børn hava latið lív í krígnum, og fleiri hava hildið, at myndugleikarnir gera ov nógv av. Men onnur siga, at í kríggi er vanligt, at børn og ung taka seg saman, tá tey fjala seg, og tí doyggja ofta lutfalsliga nógv børn í kríggi og serliga loftálopum, skrivar AP. Ein onnur frágreiðing er, at umleið 30 prosent av libanska fólkinum eru yngri enn 18 ár, og at har suðuri í Libanon hava fólk yvirhøvur nógv børn.

– Húski, sum hava fimm ella kanska seks børn, fjala seg ofta saman, og tí slepst ikki undan, at loftálop kosta lutfalsliga nógvum børnum lívið, sigur Aris Salim hjá ST-barnahjálparstovninum Unicef við The Independent.

### Leypa á sivilmál

Tað er eisini greitt, at kríggið fær stórar sálarligar avleiðingar fyri børnini í krígsøkinum.

– Tey síggja ymiskt, sum børn í Evropa ongantíð hava sæð ella fáa at síggja, sigur sálarfrøðingurin Rania al-Ameri við The Independent.

Mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch skrivar í einari frágreiðing, at ísraelska herleiðslan ger ov lítlan mun á hernaðarligum og sivilum málum. Felagsskapurin, sum hevur høvuðsstøð í USA, vil vera við, at í fleiri førum kunnu tey ísraelsku álopini á mál í Libanon lýsast sum krígsbrotsverk. Ísraelska herleiðslan hevur lagt Hizbollah undir at brúka sivilfólk sum livandi skjøldur, men Human Rights Watch sigur seg ikki hava funnið prógv fyri tí.

– Í fleiri førum tykist tað, sum at ísraelsku álopsmálini verða tilvildarliga vald, og í summum førum tykist tað, sum at álopini eru beinleiðis vend ímóti sivilum málum, skrivar Human Rights Watch.